## VALGREINAR

# Broyt fiskidaga-skipanina bólk 5

**Kristian Eli Zachariasen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðuroyggjum*



Fleiri valevni hava ført fram í valstríðinum, at sparingar skulu fremjast í tí almennu umsitingini. Alt gott um tað, og eri eg púra samdur í tí. Vøksturin má og skal steðgast innan ta almennu umsitingina. Spurningurin er bara hvussu? Ein hevur ikki hoyrt nakað ítøkiligt uppskot í hesum valstríðinum, um hvussu hendan sparing skal fremjast, heldur hava uppskotini verið háfloygd og til tíðir heldur tunn.

Men, fyri at venda aftur til yvirskriftina, "Broyt fiskidagaskipanina fyri bólk 5", so er nakað ítøkiligt at taka fatur á her. Sum er, er bólkur 5, tað vil siga bátar undir 15 tons, býttir í ein A og B bólk. Í bólki A hevur hvør einstakur bátur eina ávísa nøgd av fiskidøgum tilknýtta. Ímeðan í bólki B fiska allir bátarnir uppá eina "felagskonto" av fiskidøgum.

Umsitingarparturin av bólki 5 krevur óiva nógva orku, og tískil eisini pening, eftirsum fiskidagatalið ið er tilgóðar í bólki 5 alla tíðina skal vera undir eftirlitið.

Sjálvstýrisflokkurin vil arbeiða fyri, at allir bátar undir 15 tons, kunna fiska frítt.

Ein slík skipan vildi verið til fyrimuns fyri bæði tað almenna og fiskimannin, tí:

- Tað almenna kemur at spara pening, av tí tað ikki verður neyðugt at seta orku av til at umsita fiskidagarnar í hesum bólkinum longur.
- Fiskimaðurin sleppur undan at hugsa um, hvussu nógvar fiskidagar hann hevur brúkt ella hevur tilgóðar.

Hetta tann gongda leiðin.

Gott val

# Alternativ orka

**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Eitt av málunum sum er frammi í valstríðnum er alternativ orka. Undarligt, at vindur, vatn og streymur sum vit eiga so ríkiligt av, skal kallast alternativ orka, meðan olja sum kemur langan veg til landið ikki er alternativ.

Grundin til hetta er, at vit ikki hava dugað at útnytta náttúrugivnu møguleikarnar í landinum.

Altíð hava vit helt okkum til tað sum aðrir hava gjørt, heldur enn at brotið uppum armar og sjálvi funnið útav at nýta tað sum liggur líka fyri durum okkara.

Nú er tíbetur vend komin í. Vindur og vatn, sum er tað mest natúrliga hjá okkum at útnytta, er endiliga á veg at gerast tíðandi partur av orkutørvi okkara.

Tað verður ein stórur dagur, tá vit hava nærkast náttúruni í so stóran mun, at tað verður oljan sum verður alternativ orka og ikki øvugt.

Bert spell, at náttúran ikki verður spurd um árinini, fyrrenn vit hava gjørt inntrivini í hana.

Sjálvstýrisflokkurin vil virka fyri at oljan gerst alternativ og sekunder orka í landi okkara.

X við lista D.

# Talibanar í Føroyum?

**Tórarinn Niclasen**
*Valevni Tjóðveldifloksins í Norðstreymi*



Fekk ein skelk, táið valskrá Miðfloksins varð løgd fram.

Allur stuðulin til mentanina skal burtur! Um vit í hesum lítla samfelag skulu hava eitt so ríkt og fjøltáttað mentanarlív, so er neyðugt at fjálga um tey fólk, ið tíma at fáast við slíkt. Tey spinna so sanniliga ikki gull av hesum. Men tey royna at styrkja okkara samleika sum tjóð.

Hugsi um allar tær fløgur og bøkur, ið koma út á okkara lítla máli. Tað er í roynd og veru ótrúligt. Málningar prýða heim okkara, og standmyndir standa ymsastaðni; ein frægd fyri eygað. Og vit kunnu lata okkum hugtaka av frálíkum leikum í okkara leikhúsum.

Men tað skal ikki vera so.

Stóð tað til Miðflokkin, so stóð ikki ein standmynd eftir, ið ikki var ílatin. Ongin fløga ella bók hevði komið út, ið ikki hevði ein kristiligan boðskap.

Hava vit sætt hetta fyrr?

Jú, tað hava vit. Í Afganistan. Talibanarnir har beindu fyri øllum leivdum av gamlari mentan. Teir bannaðu alt, ið ikki hóskaði til teirra áskoðan. Ongin slapp at lesa ella skriva nakað, sum teir ikki kundu góðtaka. So kunnu vit spyrja, um hetta er tað, vit vilja hava í okkara samfelag? Har má svarið verða eitt klár og týðuligt - NEI!

Tað kann ikki vera rætt, at ein bólkur, ið umboðar 3 - 4% av fólkinum, skal siga, hvat øll hini 96 - 97% skulu hugsa og gera.

Áskoðanin hjá Miðflokkinum er beinleiðis lívshættislig; men sigur tú nakað, so fært tú Bíbliuna undir vangan og verður kallaður heidningur.

Vónandi lata fólk seg ikki taka av fótum av hesum fundamentalistisku ekstremistunum. Tað hevði verið sera niðurbrótandi fyri samfelagið.

Velji tí ein sterkan Tjóðveldisflokk á ting, tí vit verja mentanina.

# Ein trygg og dynamisk eftirlønarskipan

**Carl August Arge**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Øll eiga at fáa eina trygga eftirløn. Sjálvstýrisflokkurin hevur hetta í síni valskrá. Eingin eigur at ganga og stúra fyri hvussu korini nú vera, tá vit tá vit gevast í lívsstarvi okkara.

Eingi undantøk eiga at vera.

Vit skulu ikki senda rokningina fyri okkara eftirløn til okkara børn - og heldur ikki til skattgjaldaran í øðrum landi - hina víðagitna vaskikonan á Nørrebro

Ómetaliga nógv hevur verið tosað um hetta; men einki er komið burturúr.

Stríðið tykist snúgva seg um eftirlønin annahvørt skal vera samhaldsføst (solidarisk) ella um meira privatar, egnar, loysnir skulu viðmælast.

Politikararnir vóru tó nærum fullsamdir í at gera sína egnu, sera generøsu, skipan. Teir vaknaðu tó við kaldan dreym av fólksins rættvísu vreiði og bakkaðu tað besta teir dugdu.

Nógv politikara-vanvirðing stóðst av hesi ósømuligu hending. Skal mann vera vinarligur, kann sigast at hetta vísti hvussu sera menniskjansligir politikarar eru.

Eg mæli til at vit hugsa í øðrum banum. Í Svøríki varð eftirlønarskipanin reformerað fyri fáum árum síðani. Hon virkar væl og er stuðlað av nærum allari politisku skipanini.

Sjálvandi kunnu vit ikki bara innflyta hana, men eg haldi at hon er sera áhugaverd og eigur at geva okkum íblástur at tilevna okkara egna reform.

Høvuðstáttirnir eru:

1. Ein viðurkenning av at einasta kelda til vælferð stavar frá tí fíggjarliga vøkstri sum vinnulívið skapar.

2. Tað fíggjarliga grundarlagi undir okkara eftirløn skulu vit sjálvi skapa - vit skulu ikki senda rokningina til komandi ættarlið.

3. Eftirlønin kann hava upp til 4 partar: a) eina grundupphædd sum øll fáa (fólkapensión), b) ein "vinningspart" sum hvør einstakur hevur stóra ávirkan á, c) eftirløn frá arbeiðsmarknaðinum og d) eina eftirløn sum tann einstaki møguliga sjálvur hevur spart upp til.

Tað nýskapandi er b) Vinningsparturin. Tú ført tilluta "poeng" sum eina fylgju av tínum lívsvalum. Hægri inntøka gevur fleiri poeng, ávíst prosent av lønini fer í skipanina. Men eisini læra og lestur gevur poeng. Líkaleiðis fær húsmóðurin poeng og somuleiðis við sjúku og arbeiðsloysi ert tú tryggjaður ávís poeng.

Poengini svara til so og so nógvan pening. Peningin skal vera í eftirlønarskipanini, men tú kanst sjálv/ur avgera hvussu tú plasera peningin.

Tú kanst seta hann í almenn lánsbrøv, sum eru 100% trygg (men geva lítla rentu) ella tú kanst plasera peningin í virðisbrøv við meira váða - og møguleika fyri væl størri vinningi.

Alment góðkend feløg (bankar, tryggingarfeløg, íløgufeløg) bjóða seg fram sum forvaltarar. Alskyns tilboð eru: tú kanst satsa uppá vinnulívið í heimlandinum ella í heilt øðrum heimsparti, hevur tú hug til tað.

Tú kanst altíð skifta forvaltara. Hesir eru undir strangum tilsýni av almenna fíggjareftilitinum.

Fyrimunirnir við hesari skipanini eru nógvir:

- fólk fáa nógv størri áhuga í at vinnulívið gongur væl;
- ann egna ábyrgdin og egnu valmøguleikarnir gerast nógv størri uttan at trygdin hvørvir;
- fólksins egna avrik er gundin undir eftirlønini - ikki avrikini hjá børnunum;
- vinnulívið verður fólksins ogn
- Skal vinnulívið í heimlandinum fáa part av eftirlønarmilliardunum, má tað prógva kappingarføri mótvegis bestu alternativum í útlandinum.

Tað verður ov drúgvt at fara í smálutir her, men:

- í sambandi við ynski hjá øllum um sjálvberndi búskap,
- í sambandi við at okkara virðisbrævamarknaður nú fer at virka,
- í sambandi við komandi einskiljingar av almennu fyritøkunum,
- í sambandi við kapitaltørvin í landinum og
- í sambandi við ein óloystan eftirlønarspurning - sum viðkemur okkum øllum- haldi eg hetta er gongda leiðin.



## VALGREINAR

# Altjóða ábyrgd og umhvørvið

**Bergur P. Dam**
*valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymoy*



Føroyar eiga at seta Kyoto-sáttmálan í verk. Samstundis má átak gerast fyri at útbyggja umhvørvis og náttúrvinarligu orkukeldurnar.

Fólksliga undirtøkan fyri eini broyting av orku- og umhvørvispolitikkinum tykist alsamt at vaksa - tíbetur.

Farandi samgonga hevur eisini í hesum málið sovið í tímanum. Eisini her hava tey runnið undan ábyrgd.

Grefligasta dømi um hesa ábyrgdarundanstøkking er støðan til Kyoto-sáttmálan. Alt meðan tey róptu um ábyrgd, heittu tey á donsku stjórnina um at taka fyrivarni fyri Føroyum, tá Danmark staðfesti Kyoto-sáttmálan. Undanførslan var, at oljuvinna kanska fór at taka seg upp í Føroyum.

Samgongan, sum hevur verið eyðkend av rakstrarrópum av alskyns slag, gav eini boð til heimin: "Vit vilja sleppa at halda fram við at økja um dálkingina".

Vit skulu eisini við.

Javnaðarflokkurin ætlar, at Føroyar skulu staðfesta og seta í verk Kyoto-sáttmálan. Vit eru sannførd um, at eisini vit hava ábyrgd av at framtíðar ættarlið kunnu liva í so reinum umhvørvi sum gjørligt og kunnu troyta náttúruna, uttan at oyðileggja hana.

Tí skulu vit eisini seta okkum mál fyri at røkka ásetingunum í Kyoto-sáttmálanum um at minka útlátið av vakstrarhúsgassum.

Hesi mál kunnu snúgva seg um tiltøk, sum vit heilt skjótt kunnu fara undir. Tað ber til dømis til at økja um vindorkuframleiðsluna eftir stuttari tíð. Undanførslurnar hjá SEV kunnu vit ikki longur brúka - hevur SEV trupulleikar við kervinum, má SEV loysa teir trupulleikarnar.

Somuleiðis kunnu vit betra møguleikarnar fyri sólorku. Nakrar royndir eru gjørdar og tær vísa, at í vanligum sethúsum minkar oljubrúkið munandi, um sólorka eisini verður brúkt til hita í húsarhaldinum.

Fyri stuttum varð farið undir eina spennandi verkætlan um alduorku í Sandoynni. Verkætlanin er stuðla av fleiri pørtum - m.a. ES, SEV og øðrum. Men ein luttakari er ikki við, og tað eru almennu Føroyar. Føroyski umhvørvismyndugleikin vildi ikki verða við, men frásegði sær henda gylta møguleika at verða við. Her má vend koma í.

Ein av stóru dálkingarkeldunum er skipaflotin, serliga fiskiskipaflotin. Íslendingar hava sett sær stór mál hesum viðvíkjandi. Í dag koyra bussarnir í Reykjavík við brintorku, síðan koma bilarnir og at enda skal eisini skipaflotin fáa orku frá brennikyknum.

Javnaðarflokkurin heldur, at føroyingar eiga at sleppa sær uppí hesa verkætlan. Tað almenna eigur at hjálpa føroyskum granskarum og íbirtarum at fáa í lag samstarv á hesum øki.

Tá Javnaðarflokkurin aftur kemur í samgongu, fær eisini umhvørvisøkið C-vitaminir.

# Eldrarøktin: Siga eitt og gera eitt annað

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Sum ikki eina ferð, hevur hetta valstríðið dyggiliga prógvað og staðfest, at eldraøkið er eitt av afturvendandi evnunum, ið allir flokkar vilja gera til sítt hjartamál.

Tað er sjálvandi gott. Men minni gott er tað, tá fleiri av hesum flokkum bara vísa evninum áhuga við orðum og ikki í gerð.

Síðstu seks árini hevur eldraøkið verið forsømt og súltað. Halda tit veruliga, at tað er hugaligt ella stuttligt hjá okkara eldru, at tey enn eina ferð skuldu gerast kastibløka millum politiskar flokkar, uttan at nakað varð gjørt?

Sum eg longu havi nevnt fleiri ferðir, er ikki eitt einasta ellis- og røktarheim bygt hesi seks árini. Tað er tíverri veruleikin í Føroyum í dag.

Enn meira hugstoytt er tað, at landsstýrið við einum pennastroki slapp sær av við 366 milliónir krónur av blokkstuðlinum, ið kundi givið røktarpláss til 400 av okkara gomlu.

Vit skylda teimum, ið hava lagt lunnar undir okkara samfelag, at vit tryggja teimum góðar umstøður og eitt gott lív, tá lívskvøldið er komið.

Hesum vil Sambandsflokkurin virka fyri, men megnar tað tó ikki einsamallur. Til tað krevst stuðul frá veljarunum, ið kunnu avgera, hvussu stýrast skal næstu árini.

Týsdagin hevur tú gylt høvi at stuðla Sambandsflokkinum, so eisini vend kann koma í á eldraøkinum. Alt annað er óvirðiligt!

# Føroyar og ES

**Rói Egholm**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Suðurstreymoy*



Politikarar hava verið frammi við tankanum um, at Føroyar skulu limast inn í ES.

Í drúgvu royndum mínum í samhandli við útheimin havi eg vitjað hjá nógvum vinnufyritøkum í grannalondum okkara.

Tað sum ferð eftir ferð gongur aftur er, at tey lond, sum hava ein munandi fiskiflota, eitt nú Hetland, Skotland og Danmark, eru á einum máli um, at fiskivinnupolitikkurin hjá ES ikki hevur tænt endamálinum hjá hesi vinnu.

Tað vísir seg eisini, at í Danmark er ein tann størsta mótstøðan ímóti ES júst innan fiskiídnaðin og millum fiskimenn.

Í Føroyum hava vit í longri tíð havt ein heldur slakan og lítið kreativan vinnupolitikk. Úrslitið er, at vinnan ikki hevur megnað at fingið fleiri bein at standa á enn tað eina, nevniliga fiskivinnuna.

Við hesum í huga tykist tað mær sum óðamannaverk av okkum sum tjóð at miða eftir at verða innlimað í ES.

Eftir mínum tykki er tað av størsta týdningi, at vit taka kjakið upp og veruliga seta okkum inn í, hvørjar avleiðingarnar eru av at verða innlimað í hendan felagsskap.

Sum gongdin er í løtuni, so letur Danmark meir og meir av sínum sjálvræði til ES, og eru vit ikki á varðhaldi her í Føroyum, so kunnu vit verða drigin inn í ES gjøgnum bakdyrnar, har vit verða sett skák og mát í globaliseringstalvinum uttan møguleikan fyri verjuleiki.

Vit eiga at gera alt fyri, at vit heldur fáa so góðar sáttmálar við ES sum gjørligt, og annars halda føroysku tjóðina uttan fyri hendan felagsskap. Limaskapur í ES kann í mínum hugaheim als ikki koma upp á tal, fyrr enn vit eru ein fræls tjóð við fullum avgerðarrætti.

Tjóðveldisflokkurin er besta trygdin fyri, at Føroyar gerast frælsar, og at fólkið her býr sjálvt sleppur at gera av leiklut sín í heimssamfelagnum. Minnist til tað góðu veljarar á valinum 20. januar.

Bara við einum sterkum Tjóðveldisflokki kunnu vit savna sjálvstýriskreftirnar í hinum flokkunum og soleiðis halda fram við arbeiðinum at fáa ein sjálvberandi búskap og harvið grundarlag fyri, at føroyingar taka tað fullveldi, sum so mong av okkum tráa eftir í hjørtum okkara.

# Orka - orkutrupulleikar - orkumøguleikar - Orka

**Kjartan Joensen**
*valevni Fólkafloksins í Eysturoy*



Nú um halguna hevði Útvarpi sera áhugaverdar sendingar um jólahald á útoyggj ella á bygd. Hetta var prát við skilafólk av bygd ella fólk, sum hevði samband, røtur ella eitthvørt tilknýti til bygd og bygdalív fyrr. Og í sendingini var komi inn á torv, jólatorv og torvskurð. Tað sum rann mær í tankarnar, sum eg sat soleiðis og líddi á, var: hvussu høvdu Føroyar sæð út, um vit enn skóru torv? Allur hagin hevði veri torveygu og nógvastaðni svart, tí alt var skorið niður á klett ella eyr. At skera torv var alneyðugt tá, tí hetta var einasta orkukelda okkara……

Vit eru komin longu fram á leiðina í dag. Torvið er avloyst av øðrum orkukeldum, og tøknin, maskinútbúnaður og vitan eru drívmegin í at temja orkuna - vind, áir og vøtn. Í Føroyum framleiða vit ravmagn í dag upp á tríggjar mátar: við dieselmotorum, við vatni og við vindi. Í 50unum var stór vatnorkuútbygging í Vestmanna, SEV sá dagsins ljós og arbeiðið við at veita øllum íbúgvum landsins ravmagn helt fram, og hetta eydnaðist eisini. Men orkutørvurin bara vaks, og tað næsta stórarbeiðið fór í gongd - at demma Eiðisvatn fyri síðani at veita allar áir í stórum pørtum av eysturoynni norður til Eiðis. Hetta kostar bæði í krónum, oyddum djóralívi og spiltari náttúru - allar tær stóru, vøkru fossandi áirnar eru farnar undir heilt. Lívið í áunum hevur ongan møguleika og eftir stendur lívið sum tann stóri taparin, ikki mítt og títt lív, men lívið hja maðkapirrum í hópatali, hjá heygsmannalarvum, mýggjabitum, ja, hjá øllum teimum, ið valdu sær hesar føroysku áir sum sítt búpláss, sum sítt friðarstað á jørð. Thulebúgvar mistu sítt friðarstað her á jørð, og í dag gongur ein stór rættarsøk um tað teir mistu. Ikki fara maðkapirrur og heygsmannalarvur at føra nakra rættarsøk, men vit menniskju eiga at tala at, tí her gerst so nógv annað. Náttúran dugur at greiða okkum frá øllum vit vilja hava at vita. Einasti trupuleikin hjá náttúruni er at hon onga rødd hevur, onki mál - dugir ikki at tosa. Men náttúruindikatorarnir eru har…..teir tala alla tíðina til okkara…..

Okkara stóri orkumøguleiki er havið og tær rørslur, sum í tí eru. Tað er almikið av streymi í firðum og sundum okkara, eystfall og vestfall, tey hava altíð verið har og tey fara altíð at vera har. Tað skuldi verið lætt at gjørt brúk av hesum. Havið í rørslu goymir hundrað ferðir so nógva orku í sær sum vindurin ger. Tøknin til at gera brúk av streyminum er tøk og so skemmir ein møgulig orkuútnyttan her einki landslagið og tað viðbrikna djóralívið í áunum verður skónað. Hesin orkumøguleikin saman við vindorku kann, um vilji er til tess, gerast høvðusorkukelda okkara.

Hetta er mál, sum fólkaflokkurin fer at gera nakað við. Vit fara altíð at hava tørv á orku til mong endamál, og tær viðvarandi orkukeldurnar vara við, landi og fólki at stórum gagni bæði nú og fyri alla framtíð. Vit eiga at troyta okkara náttúrugivnu møguleikar uttan at gera brotsverk móti náttúruni. Eisini her sær Fólkaflokkurin møguleikar….Eisini hetta styðjar uppundir ein meira sjálvberandi búskap.

Vel Fólkaflokkin ella eitt av valevnum hansara.